## Reyður meiriluti

Samstundis sum Fólkatingið fór undir nýggja setu fyrrapartin, vísir ein meiningakanning, at stjórnin hjá Lars Løkke Rasmussen, forsætisráðharra hevði fallið, var val nú. Kanningin, sum danska kringvarpið hevur latið gera, vísir, at andstøðan hevði vunnið, um fólkatingsval var nú. Men sigurin hevði verið sera tepur, tí andstøðan hevði fingið ein tinglim fleiri enn teir tríggir flokkarnir aftan fyri stjórnina. Kanningin gevur Sosialdemokratunum framgongd. Teir tríggir flokkarnir aftan fyri stjórnina fáa at kalla somu undirtøku sum í seinastu kanning, sigur DR.



## Ongan fisk úr Kanada

Djóraverndarfelagsskapurin Humane Society International vil hava matstovur í ES-londunum at gevast við at borðreiða við fiskavørum úr Kanada. Talsmaðurin hjá felagsskapinum, Mark Glover, fegnast um, at ES hevur sett forboð fyri øllum handli við kópaskinnum, men leggur afturat, at bannið eigur eisini at umfata allar kanadiskar fiskavørur. Humane Society International hevur roynt at fáa matstovur í USA at strika kanadiskar fiskavørur av matskránni, men tiltakið eyudnaðist ikki til fulnar, skrivar AP.

# Jan Højgaard einsamallur um at tveita fýra mans út

**Formaðurin í Føroya Fiskimannfelag hevur av sínum eintingum burturvíst fýra fiskimonnum úr felagnum, uttan at tað er viðgjørt í nevndini. Næstformaðurin í felagnum sigur, at málið má viðgerast av nýggjum**

BURTURVÍSING

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Jan Højgaard, Højgaard, formaður í Føroya Fiskimannafelag, ráðførdi seg ikki við nevndina í felagnum, tá ið hann herfyri burturvísti fýra monnum úr felagnum, sum vit greiddu frá í fríggjadagsblaðnum.

Og tað er samstundis púra vist, at seinasta orðið í málinum er ikki sagt enn.

Næstformaðurin í Fiskimannafelagnum, Eyðun Johannesen, ger í øllum førum greitt, at hann vil hava málið tikið upp til nýggja viðgerð.

Annars er hann rættiliga fámæltur um avgerðina at burturvísa fýra fiskimonnum úr felagnum.

Hann staðfestir, at málið er ongantíð viðgjørt á nevndarfundi.

Men samstundis staðfestir hann púra avgjørdur, at hetta málið er so mikið álvarsligt, at tað kann forða teimum at sleppa til skips við føroyskum skipi.

- Tí skuldi málið avgjørt verðið viðgjørt á nevndarfundi, áðrenn nøkur stig, sum hesi, vórðu tikin og vit mugu nú fáa málið til viðgerar í nevndini

- Sostatt má tað sum er hent, standa fyri formansins egnu rokning, sigur Eyðun Johannesen.

### Jan kúvendir

Sjálvt um Jan Højgaard segði fyri Sosialinum fríggjadagin, at nevndin í felagnum var samd um at burturvísa menninar í felagnum, váttar hann nú, at málið hevur ikki verið fyri á nevndarfundi.

Tað helt hann annars, at tað hevði, men eftir at hann nú hevur leitað í gerðarbókini, ásannar hann, at tað málið hevur ikki verið viðgjørt á nevndarfundi.

Hann sigur, at talan var um tveir mans, sum vóru limir í felagnum, sum vórðu útihýstir. Samstundis var talan um tveir aðrar mans, sum ikki vóru limir í Fiskimannafelagnum, men sum hava fingð boð um, at teir heldur ikki sleppa at verða limir.

Men nú stendur í viðtøkunum hjá tykkum, at formaðurin tekur støðu í dagliga fyrikomandi málum.

Tað kann hetta valla siggast at vera og sostatt eru tað nógv, sum eru sannførd um, at tað var ólóglig framferð av formanninum, tá ið hann einsamallur tók avgerðina um at burturvísa teimum fýra fiskimonnunum, sum hann sjálvur váttar í aðrari grein her á síðunum.

Vit spyrja eisini Jan Højgaard um málið ikki skuldi verðið lagt fyri nevndina.

- Tað kundi tað gott, men viðhvørt má mann handlað sjálvur. Í hesum føri tóku teir eitt arbeiði upp, vit høvdu blokerað og tað hevði onki fakfelag góðtikið, sigur hann.

Annars sigur hann, at hann tosað við nevndarlimirnir umvegis telefon um hetta málið. Kanska hevur hann ikki fingið fatur á øllum, men hann tosaði við nakrar.

Men, nú er Carlton málið meiri enn hálvtannað ára gamalt, hví koma burturvísingarnar ikki fyrrenn nú?

- Tað er tí at vit hava fingið nógvar afturvendandi áheitanir frá limum í Fiskimannafelagnum, sum hava kravt, at tað skuldi fáa avleiðingar, sigur Jan Højgaard.



*Jan Højgaard var í sjálvdrátti, tá ið hann burturvísti fýra fiskimonnum úr Føroya Fiskimannafelag, tí hann legði ikki málið fyri nevndina, men nú krevur næstformaðurin í Fiskimannafelagnum, at málið verður lagt fyri nevndina*

# Útblakaðir fiskimenn sluppu ikki at verja seg

Teir fýra fiskimenninir, sum nú eru burturvístir úr Føroya Fiskimannafelag, sluppu ikki at verja seg, áðrenn burturvísingin varð sett í verk.

Tað siga onkrir av teimum, vit hava tosað við, men sum vilja verða ónevndir.

Men Jan Højgaard, formaður í Føroya Fiskimannafelag, váttar, at menninir fingu ikki ætlanina um burturvísingina til hoyringar so at teir sluppu at siga sína hugsan.

Tað halda menninir, átti at verið eitt minstakrav tá ið hugsað verður um, hvussu álvarligar avleiðingar ein burturvísing hevur, tí tað merkir í veruleikanum, at teir sleppa ikki aftur til skips á føroyskum kjøli.

- Teir spurdu ikki okkum um tað var rætt, sum teir gørdu, so tað má ganga báðar vegir, er svarið frá Jan Højaard.

Annars er brævið, har teir verða burturvístur, rættiliga stuttorðað.

Har stendur bara at …. Vit gera vart við, at tygum xxxx ikki eru limir hjá okkum.

Hetta hendi, tá tygum mynstraðu umborð á Carlton, sum var í stríð við § 13, ið gevur burturvísing frá Føroya Fiskimannafelag.

Brævið er undirskrivað av Jan Højgaard.

Her kann leggast afturat, at grein 13 í viðtøkunum sigur ikki, at limur skal verða burturvístur, men at hann kann verða burturvístur.

Men tað stendur eisini í viðtøkunum hjá Fiskimannafelagnum, at…. felagsformaðurin hevur ábyrgd av dagligu leiðslu felagsins og tekur avgerð í dagliga fyrikomandi málum....

Sostatt eru tað nógv, sum eru sannførd um, at tað var ólóglig framferð av formanninum, tá ið hann einsamallur tók avgerðina um at burturvísa teimum fýra fiskimonnunum, sum hann sjálvur váttar í aðrari grein her á síðunum.

At burturvísa fólki úr felagnum, kann neyvan kallast eitt dagligt fyrikomandi mál, sum er arbeiðsøkið hjá formanninum og tí skuldi tað verið lagt fyri nevndina. Og sum tað sæst á hinari greinini, er tað nettupp tað, sum næstformaðurin í Fiskimannafelagnum krevur.